# Ein áhugaverd og óvanlig framsýning

FRAMSÝNING

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Hevur tú ikki havt stundir at síggja framsýningina í listahøllini hjá Tórshavnar Skipasmiðju, so hevur tú tó møguleikan nú, áðrenn síðsta útkall. Heystframsýningin við fleiri av okkara kendastu listafólkum letur aftur sunnudagin. Hon er opin í dag frá 14 til 17 og leygardagin frá 14 til 18 aftrat.

Stúgvandi fult av fólki var í hesi sjáldsomu listahøllini, tá latið varð upp herfyri. Síðani tá hava eisini mong túsund leitað sær innar á gólvið at uppliva nýggjastu listina hjá so frægum listafólkum sum Torbjørn Olsen, Zacharias Heinesen, Trónda Paturssyni oø.

Millum tey mongu vitjandi, tá framsýningin lat upp, var eisini okkara kendasti listamálari, Ingálvur av Reyni. Vit spurdu hann, hvat honum dámdi: – Hetta er ein sera áhugaverd framsýning. Hon er eisini óvanlig, tá hugsað verður um hølini og staðið, so tað er bara gott at síggja nakað nýtt.

Tað sjáldsama við framsýningini eru sjálvandi fyrst og fremst serstøku hølini. Ein fyrrverandi arbeiðshøll, ið hevur verið brúkt í sambandi við skipasmíð, er innrættað til endamálið. Hon er málað hvít øll sum hon er. Hon er óvanliga stór, rúmlig og ljós og við súlum á gólvinum, sum seta sín serstaka dám á hølini.

Høllin er í tí grøna bygninginum hjá Skipasmiðjuni oman fyri Bacalao.

Lesið eisini samrøðu við listamannin Zacharias Heinesen í leygardagsblaðnum um nýggju framsýningarhølini og framtíðina



*Høvdingar hittast. Bárður Jákupsson bjóðar Ingálvi av Reyni vælkomnan í nýggju listahøllina*

*Mynd Jan Müller*



*Hølini eru stór, rúmlig, ljós og livandi. Frá ferniseringini*

*Mynd Jan Müller*



*Nakrir av framsýnarunum í listahøllini beint undan ferniseringini*

*Mynd Jan Müller*



*Frá ferniseringini herfyri*

*Mynd Jan Müller*